ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND HEALTH

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postbox 3279, Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

8. januar 2026
J.nr: 25/31909-7
Tygara skriv: 25/08929
Viðgjørt: BÁT

Hoyringarsvar

Almanna- og heilsumálaráðið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt til ummælis.

Vit meta ikki, at uppskotið fær avleiðingar fyri almannaøkið og Almannaverkið, men fara vísa á, at vit eru samd við hoyringarsvarinum hjá Almannaverkinum, at verandi lógargrundarlag er heldur ógreitt, tá ið ósemja er millum kommununar og Almannaverkið um, hvørt eitt barn eigur at fáa tilboð sambært dagstovnalógini ella almannalógini.

Vinarliga

Barbara Á. Thomsen
fulltrúi